UTTAN ÚR HEIMI

## Keypa partabrøv á alnótini

Hetta seinasta árið hava altsamt fleiri og fleiri norðmenn valt at keypa sær partabrøv ígjøgnum alnótina.

Sambært blaðnum Aftenposten var hesin handilin serliga lívligur í desember, tá norðmenn keyptu partabrøv fyri 4,6 milliardir krónur ígjøgnum alnótina. Tað var 40 prosent meiri enn í sama mánað í 2002. Umleið ein fjórðingur av partabrævakeypinum var ígjøgnum fyritøkur, sum fáast við at selja virðisbrøv, men nógv viðskiftafólk nýta eisini alnótina í samskifti sínum við bankan, tá tey keypa partabrøv.

Fyrr vóru tað vanliga teir sokallaðu smásparararnir, sum keyptu partabrøv ígjøgnum alnótina, men soleiðis er ikki longur. Nú eru tað eisini stórir íleggjarar, sum nýta alnótina, tá teir keypa partabrøv, skrivar Aftenposten.

## Danir bíleggja 100 skip

Danski handilsskipaflotin hevur so góðan byr sum sjáldan fyrr, og áhugin fyri at byggja nýggj skip er sera stórur. Umleið 40 prosent av skipunum verða bygd í Kina, men øll skulu sigla undir donskum flaggi.

Jan Fritz Hansen, sum er varastjóri í danska reiðarafelagnum, sigur við Jyllandspostin, at í løtuni hava donsk reiðaríir bílagt umleið 100 skip, og tað er tað mesta nakrantíð, sigur hann. Orsøkin er sjálvandi, at reiðaríini hava nóg mikið av farmi at flyta, og tí tey vinna pengar.

Næststørsta reiðaríið í Danmark, Torm, hevur bílagt 14 nýbygningar og hevur higartil fingið átta teirra. Árið í fjør royndist sera væl hjá felagnum, sum væntar, at roknskapurin fyri 2003 fer at vísa 370 milliónir krónur í avlopi. Í ár verður avlopið um 500 milliónir krónur, sigur stjórin, Klaus Kjærulff. Høvuðsorsøkin er, at flutningsgjøldini hækkaðu sera nógv í fjør, og hjá einum parti av flotanum vórðu tey trífaldað.

## Bora longsta brunnin

Oljufelagið Statoil hevur gjørt av at bora ein nýggjan brunn, sum samstundis verður tann longsti, sum nakrantíð er boraður í Norðsjónum.

Statoil ætlar at vinna olju í Gulltopp-fundinum, har olja er staðfest, men felagið ætlar bora brunnin við einum palli, sum stendur á Gullfaks-leiðini. Tað eru tíggju kilometrar ímillum Gullfaks og Gulltopp, og ein so langan brunn hevur einki felag borað í Norðsjónum fyrr. Kortini fer boringin ikki at kosta meiri enn 300 milliónir norskar krónur.

Men vansar eru, tí sambært Bergens Tidenhde er tað ein stór avbjóðing at bora tíggju kilometrar vatnrætt, og í Statoil ásanna tey eisini, at hetta kann gerast ein trupulleiki. Eydnast boringin hinvegin, ætlar felagið at nýta somu mannagongd við nøkrum øðrum fundum á somu leið.

## Iran byggir skip í Noregi

Iransku myndugleikarnir hava bílagt sjey bjargingarskip frá Båtservice Holding í Mandal í Noregi.

Bjargingarbátarnir verða 20 metrar langir, og hvør bátur fer at kosta umleið 16,5 milliónir norskar krónur. Teir skulu ganga skjótt, tí sambært Aftenposten verður mesta ferðin 40 míl. Arbeiðið at byggja bátarnar byrjar í hesum mánaðinum, og tann seinasti skal latast iranum innan 20 mánaðir.

Skipasmiðjan í Mandal hevur fyrr bygt bjargingarbátar fyri norsku bjargingarmyndugleikarnar og til onnur lond. Eitt nú hevur hon bygt tíggju slík skip til Turkalands.

# Viðgekk at hava myrt Onnu Lindh

**Tann 25 ára gamli Mijailo Mijailovic viðgekk undir avhoyringum týsdagin, at tað var hann, sum myrdi svenska uttanríkisráðharran Onnu Lindh**

LINDH-MORÐIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Anna Lindh varð myrd í Stockholm 10. september í fjør*

Mijailo Mijailovic hevur alla tíðina sýtt fyri, at tað var hann, sum myrdi Onnu Lindh, uttanríkisráðharra í NK-handlinum í Stockholm tann 10. september. Men undir avhoyringum seinnapartin týsdagin viðgekk hann morðið.

Tað váttaði verji hansara, Peter Althin, sambært Aftonbladet, og seinni váttaði løgreglan í Stockholm tað.

Sambært Aftonbladet skal hann eisini hava greitt nágreiniliga frá tí, sum hendi tann 10. september.

Ætlanin var, at málið ímóti Mijailo Mijailovic skuldi byrja í rættinum í Stockholm tann 19. januar, men tað er møguligt, at tað verður útsett nú. Hinvegin verður roknað við, at Mijailo Mijailovic formliga verður ákærdur tann 12. januar fyri morðið á Onnu Lindh.

# Ísraelskir hermenn verða ikki revsaðir

**Ísraelski herurin hevur kannað 70 tilburðir, har palestinar lótu lív, men eingin ísraelskur hermaður verður revsaður fyri at hava gjørt nakað skeivt**

ÍSRAEL
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Seinasta leygardag skutu ísraelskir hermenn fimm palestinar í býnum Nablus, teirra millum ein 15 ára gamlan drong. Her verða teir fimm bornir til gravar*

Tað sæst í einari frágreiðing, sum blaðið Haaretz hevur fingið fatur á. Sambært frágreiðingini hevur herurin kannað 72 tilburðir, sum kostaðu palestinsk mannalív. Trettan ísraelskir hermenn vórðu ákærdir, og teir, sum vórðu funnir sekir, fingu treytaðan dóm.

Øll málini eru tó ikki avgreidd enn. Ein mál er ímóti einum obersti í ísraelska herinum, sum varð skuldsettur, eftir at ein 90 ára gomul palestinsk kvinna doyði av skotum við eitt marknalið.

Fyri fjúrtan døgum síðani skutu ísraelskir hermenn tveir palestinskar mótmælismenn við eitt marknalið á Vestara Áarbakka. Palestinararnir doyðu av skotunum, men mánadagin boðaði herleiðslan frá, at hermenninir, sum skutu teir, verða ikki revsaðir. Ein amerikanari og ein ísraelsmaður vórðu særdir av skotum frá teimum somu ísraelsku hermonnunum, og tilburðurin hevur fingið nógva umrøðu í Ísrael, skrivar AFP.

Ísraelskir mannarættindafelagsskapir hava biðið landsins hægstarætt noyða herin at kanna allar tilburðir, har ísraelskir hermenn hava skotið óvápnaðar palestinar. Teir vilja eisini hava onnur mál kannað. Eitt nú verður víst á, at síðani palestinski uppreisturin byrjaði, hava 410 palestinsk børn latið lív. Av teimum vóru 11 pinkubørn, og 90 vóru ímillum trý og tólv ár.

Bilar

Nr. 4 • hósdagur • 8. januar 2004 • 78. árg.

# Peugeot 407 við »Ferrari-look«



*Peugeot 407 sum kemur á marknaðin í summar hevur sera spennandi og smart design. Stórt Peugeot-logo og kølaragittarið niðan fyri forlyktirnar*

**Núverandi Peugeot 406 verður í summar avloystur av einum heilt nýggjum Peugeot 407. Talan verður um ein nakað størri bil við designi, trygd og koyrieginleikum í einum klassa fyri seg**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tað verður ikki nakar léttur arvur, sum Peugeot 407 skal lyfta eftir Peugeot 406 í summar, tí 406 hevur hevur verið ein "succes" í sínum klassa, síðan hann kom á marknaðin í 1995. Men sum myndirnar sýna, verður avloysarin ein sera spennandi bilur.

Peugeot 407 verður als ikki anonymur í gøtumyndini, serliga framman er designið smart og áleypandi við stórum Peugeot-logo og kølaragittaranum í kúfangaranum, niðan fyri forlyktirnar. Tað er italski bildesignarin Pininfarina, sum eisini teknar italsku Ferrari sportvognarnar, ið hevur designað Peugeot 407. Tað sæst aftur í avbera vøkru og smartu linjunum.

Peugeot 407 verður bygdur yvir sama plattform sum Citroën C5 og verður nakað størri enn 406. Tað er ikki bert útsjóndin sum er nakað serligt, men eisini tann innbygda trygdin og koyrieginleikarnir sum verða nakað heilt serligt. Róðurgreiðir og upphangini framman og aftan eru nýggj og sera framkomin við t.d. multilink bakakslum.

Talan verður um ein sera spennandi og framkomnan bil við nógvari nýhugsan, smartum designi, trygd og koyrieginleikum í serklassa.

Fleiri bensinmotorar vera at velja ímillum: 1,8 litur við 117 hk, 2,0 litur við 136 hk, 2,2 litur (6-gir) við 160 hk, og 3,0 litur V6 við 211 hk. Tveir HDi dieselmotorar verða eisini á skránni: 1,6 litur við 110 hk og 2,0 litur (6-gir) við 136 hk, báðir hava teir innbygt FAP sótfiltur, sum Peugeot eru kendir fyri.



*Beint framman sæst hvussu nógv Peugeot 407 líkist Ferrari 612*



*Bilurin er teknaður av italska bildesignaranum Pininfarina, sum eisini designar Ferrari, tað sæst aftur í linjunum*



*Peugeot 407 SW stationcar er eisini sera snøggur*